# Sosialurin
# VARPIÐ

DR2 • Sunnudagin kl. 15.00

## West Side Story

Tíggjufaldi oscar-vinnarin er ein klassisk nútímansgerð av Romeo og Julie. Hóast framleiðslan nú er 36 ára gomuul, er evnið enn eins aktuelt, tá Richard Beymer og Natalie Wood royna at halda fast í kærleikanum í kriminalitetsrakta New York.



Kanal4 • Týsdagin kl. 20.30

## QTV – Pinligt

Vit kenna øll støðuna, har tú bara hevur hug at krógva teg. Eitt nú tá fartelefonin ringir, meðan snarlásið í buksunum er opið, ella tá tú hevur bløtt ígjøgnum hvítu buksurnar. Í QTV koma allar hesar støður fram, men samstundis roynir Pernillle at finna fram ráð, hvussu slíkar støður verða tacklaðar. Eisini hitta vit eina kvinnu, sum hevur Tourettes sjúkuna. Hetta er ein sjúka, sum ger, at pínligur støður íkoma somikið ofta, at hetta mest sum verður ein vani.



3+ • Týsdagin kl. 20.00

## Notting Hill

William Thacker eigur ein bókahandil á Notting Hill í Vestur-London. Tað gongur ikki alt og væl, men ein dagin kemur filmsstjørnan. Anna Scott, á dyr, og William veit valla, hvørjum beini hann skal standa á, fyri fína gestinum. Sum so kundi søgan enn, men bara fáar minuttir seinni kemur William at stoyta cappuccino og juice á stjørnuna, og tá hann kortini býr nærhendis, býður hann henni at koma heim til sína at skifta klæðir.

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

**FRÍGGJADAGUR 2. MARS 2007**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**